# Fiskimálaráðið

**Lógartænastan**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 07-03-2019 |
| Mál nr.: | 19/00175-1 |
| Málsviðgjørt: | BL/KM |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

## Kunngerð
## um
## avhending av kvotum í 2019

Við heimild í § 42, stk. 5 og § 81, stk. 2 í løgtingslóg nr. 161 frá 18. desember 2017 um fyrisiting av sjófeingi verður ásett:

**§ 1.** Kunngerðin fevnir um avhending av egnari árskvotu fyri eitt ár í senn, roknað fyri hvørt fiskaslag sær.

*Treytir og mannagongd*

**§ 2.** Upp í 20% av egnari árskvotu, roknað fyri hvørt fiskaslag sær, kunnu avhendast fyri eitt ár í senn til persón ella felag, sum lýkur treytirnar í §§ 5, 6, 7 og 9 í løgtingslógini. Móttakarin yvirtekur tað avhenda við teimum rættindum og skyldum, sum fylgja av egnu árskvotuni.
*Stk. 2.* Hóast ásetingina í stk. 1 kunnu í 2019 upp til 100% av egnari árskvotu av kongafiski í Irmingerhavinum og egnari árskvotu av svartkalva í Eysturgrønlandi avhendast fyri eitt ár í senn til persón ella felag, sum lýkur treytirnar í §§ 5, 6, 7 og 9 í løgtingslógini. Móttakari yvirtekur tað avhenda við teimum rættindum og skyldum, sum fylgja av egnu árskvotuni, sambært § 42, stk. 3.

**§ 3.** Tann, ið avhendar egna árskvotu, skal lata Fiskiveiðieftirlitinum skrivliga fráboðan, sum er váttað av tí, ið avhendar og tí, ið móttekur.
*Stk. 2.* Í fráboðanini skal vera upplýst, hvørji rættindi verða avhendað, hvør ið avhendar, hvør ið móttekur, og hvør prísurin er.
*Stk. 3.* Áðrenn avhending av egnari árskvotu kann fara fram, skal Fiskiveiðieftirlitið eftirkanna treytirnar fyri avhendingini og góðkenna avhendingina.

**§ 4.** Tá avhendingin er góðkend, skal Fiskiveiðieftirlitið alment boða frá hesum á heimasíðuni, www.vorn.fo, við upplýsingum um, hvørji rættindi eru avhendað, hvør ið hevur avhendað, hvør ið hevur móttikið og um prís.

*Revsing*

**§ 5.** Er ikki harðari revsing ásett eftir aðrari lóg, verður tann revsaður við sekt, sum letur inn skeivar ella á annan hátt villleiðandi upplýsingar eftir § 3, stk. 2.
*Stk. 2.* Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar verða revsað sambært reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

*Gildiskoma*

**§ 6.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 31. desember 2019.

Fiskimálaráðið, xx. mars 2019

**Høgni Hoydal**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert